## Betri eftirlit við bankunum

Danska Fíggjareftirlitið ætlar sær at hava betri eftirlit við bankum, sum váða ov nógv til ampa fyri samfelagið. Nýggi stjórin í Fíggjareftirlitinum, Ulrik Nødgaard, sigur við Jyllands-Postin, at eftirlitið skal hava betri eftirlit við bankum, sum hava tikið avgerðir, ið hava gjørt fíggjarkreppuna verri, enn hon annars hevði verið. Júst royndirnar frá fíggjarkreppuni skulu brúkast sum grundarlag undir einum betri eftirliti, og endamálið er at forða fyri, at tað skal endurtaka seg. Umframt betri eftirlit ætlar Fíggjareftirlitið at kunna almenningin betur um bankar, sum váða í meira lagi og at taka neyðug stig ímóti bankum, sum taka váðafullar avgerðir.




## Tey ungu aftur til Grønlands

Grønlendska samfelagið hevur brúk fyri teimum ungu grønlendingunum, sum eru farnir til Danmarkar at nema sær útbúgving, og um vikuskiftið varð skipað fyri einum átaki, sum skal fáa fólk at venda heim aftan á lokns útbúgving. Umleið 20 grønlendskar fyritøkur vóru við í tiltakinum, og ørindini vóru at fáa fatur á teimum ungu lesandi. Grønlendska samfelagið hevur serliga brúk fyri fleiri sjúkrasystrum, løgfrøðingum og búskaparfrøðingum. Tiltakið var í Keypmannahavn og Århus.

# meira í altjóða høpi





*- Árligi umsetningurin hjá Vónini og RFG er samanlagt 320 miljónir krónur, og bara útflutningurin hjá Vónini í Føroyum stendur fyri 93 miljónum krónum, samstundis sum lønargjaldingarnar í Føroyum eru 22 miljónir krónur um árið, segði stjórin á Vónini, Hjalmar Petersen*



*Rodmundur Nielsen, formaður í Eyturoyar Vinnulívsfelag, Hjalmar Petersen, stjóri á Vónini, Tummas Eliasen, stjóri í Lív og í íløgufelagnum Royndini og Páll Isholm, deildarstjóri og blaðstjóri á nýggja blaðnum "Vinna", sum kemur fyrsta dagin*

virksemið hjá Royal Greenland, umframt at felagið sama ár keypti 22% av Hampiðjan Group í Íslandi.

Í 2008 fusioneraðu Vónin og RFG í Noregi, har norska felagið hevur fleiri virkir norður eftir norsku strondini.

Hjalmar Petersen segði, at tað seinasta, sum er hent í ognarviðurskiftunum hjá Vónini, er, at teir, sum stovnaðu P/F Føroya Trol í Vestmanna, í ár komu innaftur í felagið.

- Her komu nakrir burturvilstir menn aftur, sum hann skemtandi tók til.

Stjórin vísti á, at tað serliga vóru umstøðurnar í fiskivinnuni, sum viðvirkaðu til, at Føroya Trol, ið mest fekst við botntrol, góvust.

- Tað er trupult við tveimum konkurerandi virkjum á sama øki, og tá er ringt at tjena pening, segði hann.

Hjalmar Petersen segði, at tó at Vónin er eitt stórt felag her heima í Føroyum og um okkara leiðir, er hetta eitt lítið felag í altjóða høpi.

- Men vit hava ætlanir um at veksa uppaftur meira í altjóða høpi, legði hann aftrat.

Við tí virksemi, sum Vónin hevur og við samstarvinum við RFG í Noregi, telist felagið í dag millum størstu veitarar í Norðuratlantshavi.

Arbeitt verður í tøttum samstarvi við vinnulívið, soleiðis at bestu úrslitini kunnu spyrjast burtur úr, bæði hvat viðvíkur verandi reiðskapi, nýggjari menning og tøkni innan reiðskap og eitt nú skiljaristir.

Málbólkurin hjá Vónini er í fyrsta lagi trolarar, nótaskip og alivinna, men felagið bjóðar eisini knowhow í tekniskum og praktiskum spurningum innan hesar vinnur.

Undir síni framløgu vísti Hjalmar Petersen eisini fleiri myndir av virkisbygningum heima og úti, sum Vónin eigur ella eigur part í, og soleiðis sóu vit eisini teir fýra bygningarnar, sum felagið hevur í Grønlandi – úr Nuuk í suðri til Umanak í norði, umframt teir sjey, ið felagið saman við RFG hevur í Noregi.

### Skynsom veiða

Stjórin gjørdi eisini burtur úr arbeiðnum og samstarvinum, sum felagið hevur við vinnuna og ráðgevandi myndugleikar um skiljirist til eitt nú rækjur og svartkjaft.

Hjalmar Petersen vísti soleiðis á týdningin við burðardyggari veiði, har skiljirist er ein týðandi partur í ávísum veiðum.

Hann nam eisini við menningararbeiði, sum hevur til endamáls at verja botnin.

- Roynt verður soleiðis at fáa fulla úrtøku úr eini trolskipan, har lemmarnir ikki ganga eftir botninum, samstundis sum trolið kortini gongur eftir botni.

Hann ásannaði, at enn kunnu teir á Vónini ikki siga, at henda trolskipan við lemmunum uppi í sjónum fiskar líka væl, sum tá lemmarnir fylgja botninum.

- Avbjóðingin er, at sjálvt trolið fær botnkontaktina, samstundis sum lemmarnir hanga uppi í sjónum. Vit eru ikki ordiliga farnir á marknaðinum við hesum enn, tó at vit síggja, at aðrir eru, legði hann aftrat.

Hjalmar Petersen segði, at fyritøkan hevur teldustýrd forrit, sum kunnu tekna trol og trolskipanir, samstundis sum til ber at simulera í brunni, hvussu trol og lemmar ganga. Á henda hátt ber eisini til at gera royndir við eitt nú skiljirist.

Stjórin nevndi eisini nakrar av stóru keyparunum av reiðskapi hjá Vónini, sum eitt nú eru heimsins størsti trolari, ið er 144 metrar langur og lastar 8.000 tons. Í sama viðgangi nevndi hann stóru verksmiðjutrolararnar hjá Thor í Hósvík, Poseidon og Athenu, sum nú er til umbyggingar í Kina – og nýggja skipið, sum gøtumenn lata byggja fyri Trónd í Gøtu.

### Stórur umsetningur

Árligi umsetningurin hjá Vónini og RFG er samanlagt 320 miljónir krónur, og bara útflutningurin hjá Vónini í Føroyum stendur fyri 93 miljónum krónum.

- Lønarútgjaldingarnar bara í Føroyum eru 22 miljónir krónur um árið, men tá er hetta bert ein partur av samlaðu lønargjaldingunum, tá felagið hevur stórt virksemi í øðrum londum kring um okkum, segði Hjalmar Petersen, stjóri á Vónini.